# Kjak



Kristianna Winther Poulsen
*forkvinna í Javnstøðunevndini*

## Eru tit fresh, dreingir?

*Ómodernað modernisering av Halgubók.*

Nýggja Testamenti verður í hesum tíðum endursagt og skal gevast út í einum fríari formi og í tíðaraktuellum hami. Bókin fær eftir ætlan eitt fresh look, og endamálið er, at tey ungu kunnu kenna seg aftur í hesum Nýggja Testamenti, stendur at lesa í grein í Sosialinum frá 1. apríl 2011.

6 menn sita í nevndini, sum stendur fyri útgávuni, og hendan umboðan er so breið sum til ber. Afturat hesum 6 koma 3 menn í umsetaratoyminum, umframt tveir, sum eisini eru tengdir at verkætlanini.

Hesir 11 menninir eru, um rætt er skilt, tann breiðasta umboðanin, ið fæst, tá ið Halgabók skal moderniserast fyri at røkka yngri ættarliðum. Blindi vinkulin er ómodernaður og óneyðugur, tí at eingin ivi er um, at onkur kvinna í onkrari samkomu onkustaðni man hava somu førleikarnar, sum teir 11 hava. Í Fólkakirkjuni eru í øllum førum fleiri. Og nýggja Nýggja Testamenti hevði kanska blivið enn meira fresh, um onkur teirra slapp framat?



Helena Dam á Neystabø

## Skeið í fakligari lesing og kunningartøkni fyri øllum lærarum

Vit kunnu staðfesta, at lesing – og kanska serstakliga fakligi lesing er ein tann størsta avbjóðingin, sum fólkaskúlin skal loysa. Pisa kanningin sigur, at uml. 1/3 av næmingunum í 9. flokki hava ikki nóg góðan lesiførleika í mun til tey krøv, sum ein miðnámsútbúgving ella onnur útbúgving treytar.

Harumframt er tann altumfatandi digitaliseringin ein daglig avbjóðing hjá bæði lærarum og næmingum. Taka vit ikki ræðið á telduni, so tekur hon ræðið á bæði okkum og næmingunum. Einki er so vist sum tað.

Eg havi tí tikið stig til at bjóða øllum lærarum skeið í fakligari lesing og kunningartøkni skúlaárini 2011/12 og 2012/13, og eg meti, at við rættari fyrireiking og ráðlegging fer hetta stóra átak at bera til.

Skúlaárini 2011/12 og 2012/13 verður árliga skúladagatalið lækkað við til samans 5 døgum, soleiðis at tveir og tríggir dagar falla ávíkavist í 2011/12 og 2012/13.

Tveir dagar verða nýttir til fakliga lesing og tríggir dagar til kunningartøkni, og verður mannagongdin, at lærarar í teimum skúlum, sum luttaka á skeiðunum í fakligari lesing skúlaárið 2011/12, fara í 2012/13 á skeið í kunningartøkni og øvugt.

Verkætlanin verður skipað soleiðis, at hon ávirkar skúlagongdina sum minst, fellur ymiskar dagar í vikuni, verður fráboðað í góðari tíð og verður ráðløgd saman við skúlunum.

Talan er so statt um verkætlan, sum Mentamálaráðið skipar fyri í samstarvi við samanlagda stovnin, Vitan. Verkætlanin verður skipað fyri øllum lærarum í fólkaskúlunum kring landið.



Marjus Dam
*Løgtingslimur fyri Sambandsflokkin*

## Fólkaflokkurin tosar við kloyvdari tungu

Er tað ikki at tosa "við kloyvdari tungu", tá ið ein í sama andardrátti bæði ætlar at minka og at økja um almenna geiran?

Tað rann mær í huga, tá ið formaður Fólkafloksins í tíðindunum í Kringvarpinum nevndi, at Føroyar vóru á fíggjarligari vandakós orsakað av einum ov stórum og alsamt vaksandi almennum virksemi og halli á fíggjarlógini. Í næsta innslagi í tíðindunum nevndi Annika Olsen, landsstýriskvinna í lógarmálum, at nú skuldu útlendingamál yvirtakast. Kostnaðurin kom at verða umleið 10 milliónir krónur árliga.

Veksur Fólkaflokkurin ikki um almenna geiran við hesi yvirtøku?

Er ikki neyðugt at taka 10 milliónir krónur árliga í láni fyri at yvirtaka hetta økið? Og skal hetta lán ikki gjaldast aftur við rentum? 10 ár merkja sostatt ein vøkstur upp á 100 milliónir krónur í láni fyri hesa einu yvirtøkuna. Harafturat koma rentur, ið sami Fólkaflokkur er serliga bangin fyri.

Tað skal nevnast, at útlendingamál í dag verða umsitin av statinum, uttan útreiðslur fyri landskassan.

Er nú rætt at yvirtaka og gjalda við lántøku?

Tað er at tosa "við kloyvdara tungu", tá ið tú ætlar at minka almenna geiran, samstundis sum tú í verki økir um hann?



Eyðgunn Samuelsen
*tingbólkaforkvinna*

## Fólkaflokkurin á vandakós

Harmaljóðini hjá Fólkaflokkinum eru syrgilig, nú hann hevur telvað seg í ein krók við at krevja fleiri sparingar, uttan at kunna vísa á eina krónu sjálvur. Haraftrat borðreiðir hann við eini rúgvu av hálvum sannleikum um fíggjarkarmarnar fyri 2012-2016, sum teir nú ikki taka undir við, sum ein verður noyddur at rætta.

Niðurlagið er, at almenni raksturin økist fyri at halda tí almenna gangandi, og at vinnan má knokkroytast, so hetta skal bera til. Skuldin má økjast til tað óforsvarliga, harmaljóðini duna uttan at víst verður á eina ta einastu loysn á trupuleikunum.

Sjálvandi skulu vit vísa varsemi tá tað kemur til almenna raksturin. Tað verður tað eisini gjørt við fíggjarkarminum, sum Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava borið niðan í Løgtingið. Fíggjarmálaráðið, Landsbankin og Búskaparráðið eru samd um, at vit standa frammanfyri einum búskaparvøkstri í 2011 og 2012.Tí hevur tað týdning, at Samgongan ikki ger tey skeivu tiltøkini nú, sum vil køva tann spírandi vøksturin í búskapinum.

### Hálvir sannleikar

Almenni raksturin økist við 100 mió, siga teir. Verðuleikin er, at raksturin økist við 46 mió. Hetta fyri at tryggja at røktarheimini, ið verða liðug í 2012, kunnu lata upp, at sjúklingar fáa neyðuga heilivágin, og at okkara ungdómur kann fara í skúla, heldur enn at liggja heima við hús.

Síðan harmast teir um tilfeingisgjald á 40 mió. Spurningurin er, um tað er órímiligt, at vinnan eisini skal lata sítt íkast til tað samfelag, sum gevur vinnuni rættindi ókeypis, so teir kunnu reka vinnu. Ivist ikki í at vinnan skilur rímiligheitina í hesum betri enn Fólkaflokkurin.

At 400 mió skulu takast inn í skattum og avgjøldum komandi fýra árini, er eisini bert ein hálvur sannleiki. Tí sambært karmauppskotinum er hetta neyðug tiltøk á bæði útreiðslu- og inntøkusíðu, fyri at fáa hallið burtur.

Skuldin viðførir eina rentu á 200 mió, pástanda teir. Sambært karmunum verður rentuútreiðslan hjá landskassanum í 2016 ikki 200 mió men 143 milliónir. Munurin á talinum hjá Fólkaflokkinum og rætta talinum er sostatt 57 milliónir, sum røkkur til rakstrarútreiðslur til meir enn 100 røktarheimspláss.

Nettoskuldin hjá landskassanum er í dag tað, sum svarar til umleið eina hálva álíkning hjá einari kommunu. Ein kommuna, sum skyldar eina hálva álíkning, verður vanliga mett at vera fíggjarlig sterk. Landskassin er tí fíggjarliga sterkur, men sjálvandi skulu vit halda fast um, at fáa hallið á fíggjarlógini burtur innan 2015. Hetta skal tó gerast við skilið, tí føroyingar skulu eisini búgva í Føroyum í morgin.

### Skattalætti til barnafamiljur

Sum rosinan í pylsuendanum pástendur Fólkaflokkurin, at vit í Javnaðarflokkinum ikki vita ,at fólk hoykna undir í skatti og avgjøldum. Munurin á okkum og teimum er, at vit ikki bert vita hetta, men eisini gera nakað ítøkiligtvið trupuleikan. Júst tí hava vit økt barnafrádráttin í karmunum við 1000 kr pr barn í 2012. Hetta kallar Fólkaflokkurin valagn. Tað má merkja, at Fólkaflokkurin ikki tekur undir við hesum skattalættanum til barnafamiljur.

### Vandakósina eigur Fólkaflokkurin

So longi sum Fólkaflokkurin situr omaná høvuðsvinnuni, verður seinur dagur at henda fær møgleika fyri verðuligari menning.

Samanumtikið er Fólkaflokkurin á vandakós, meðan Javnaðarflokkurin vísir veg burtur úr vandakósini. Ein vegur, sum Fólkaflokkurin ikki tekur undir við.Tað er trupuleikin, ikki fyri samfelagið, men fyri Fólkaflokkin.